**Fylgiskjal 6**

# SKJALATILFAR VIÐVÍKJANDI HEILSU, TRYGD OG UMHVØRVI

Í umsóknartilfarinum skal umsøkjarin skjalprógva førleika til og royndir av virksemi, ið søkt verður um í arbeiðsætlanini.

Umsøkjarar, sum lótu inn tilfar í fyrsta útbjóðingarumfari, nýtast ikki at lata inn skjalatilfar uttan so, at talan er um nýggjar ella endurskoðaðar upplýsingar.

Skjalatilfarið skal lýsa krøv viðvíkjandi heilsu, trygd og umhvørvi, og dentur skal leggjast á viðurskiftini í litra a-c:

a) Áskoðan umsøkjarans á avbjóðingar og lyklaspurningar viðvíkjandi virksemi í føroyskum sjógvi.

b) Krøv umsøkjarans til upplæring og hvussu starvsfólkið verður tikið við í ráðlegging og útinning av virksemi.

c) Umhvørvisskjalatilfarið skal innihalda:

i. eina heildarlýsing av umhvørvinum í økinum, søkt verður um
ii. eina lýsing av at umsøkjarin hevur kunnleika til viðkomandi føroyska lóggávu fyri ætlaða virksemið
iii. eina lýsing av árinum, sum ætlaða virksemi kann hava á umhvørvi, og hvørji verjutiltøk ætlanin er at seta í verk til tess at minka um hesi árin
iv. umhvørvisskipanir, sum ætlanin er at nýta til virksemi í føroyskum sjógvi.

Kravda skjalatilfarið skal lýsa veruligu umstøðurnar á økinum, sum umsóknin fevnir um.

Verður søkt i felag, skal hvørt einstakt felag útvega skjalatilfar til krøvini, ið eru ásett í litra a-c omanfyri.